

# Dóra fekk sítt ynskiskamar

Dóra er tannáringur og býr í Kollafirði. Tá ið hon yvirtók myrkabláa kamarið hjá beiggjanum, fekk hon ráðgeving frá Lindu Laksáfoss, dekoratøri, við í keypinum.

**Lagt til rættis:** Rigmor Dam **Myndir:** Jens Kr Vang

Áðrenn Linda Laksáfoss fekk fríar teymar í nýggja kamarinum, fekk hon boð um, at støðið skuldi takast í einari grønari og turkislittari pútu, sum Dóra segði seg vera so glaða fyri.

– Tað er so nógv lættari at hjálpa fólki, sum nøkulunda vita, hvat ið teimum dámar og ikki dámar.

– Og unga Dóra var deiliga avgjørd, tá ið vit fóru í býin at keypa til kamarið saman við mammuni, sigur Linda, sum er útbúgvin dekoratørur og arbeiðir sum innrættingarkonsulentur við síðuna av arbeiðinum sum lærari í Klaksvík.

Dóru dámar sera væl ítrótt og gongur til flogbólt, og tí valdi Linda at gera eitt ítróttatema í kamarinum, millum annað við bóltum, heiðursmerkjum og einari heimagjørdari Nike-lampu. ■

*”Tað er so nógv lættari at hjálpa fólki, sum nøkulunda vita, hvat ið teimum dámar og ikki dámar.*




Dóra er íðin ítróttagenta og samlar upp á bóltar. Tí valdi Linda Laksáfoss at mála nakrar rundingar á veggin, har hon eisini hongdi haldarar til bóltarnar á. Hesir eru at fáa í Inventartænastuni í Havn.



Lampur og prýðislutir hóska eisini til restina av kamarinum.
Linda Laksáfoss er dekoratørur og innrættingarkonsulentur. Hon er at hitta á tel. 757324.